# C-vitaminir til musikskúlan

**Góð útbúgving skapar dugnasemi. Soleiðis er eisini við tónleikinum. Tí hevur Javnaðarflokkurin samsundis sett sær sum endamál at styrkja musikskúlan.**



**John Johannessen**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*
*john@jokarin.com*

Ein góður musikskúli er fortreyt fyri einum góðum tónleikalívi. Vit hava ein musikskúla, sum gjøgnum árini hevu verið ógvuliga mennandi fyri ungdómin, og harvið fyri tónleikalívið í Føroyum.

Men eisini í musikskúlanum er orkan avmarkað. Millum annað av fíggjarligum ávum. Hetta vil Javnaðarflokkurin gera nakað við, fyri at fáa pláss fyri so nógvum næmingum, sum gjørligt. Og eisini fyri at skapa ein so góðan musikkskúla, sum gjørligt..

Endamálið við mentanarpolitikkinum á tónleikaøkinum má vera at geva teimum ungu so góða tónleikaliga útbúgving, so góðan førning, sum yvirhøvur gjørligt.

Tað er hetta, sum Rógvi á Rógvi eisini eftirlýsir í grein í bløðunum.

Javnaðarflokkurin er samdur. Tí løgdu vit fram broytingaruppskot til fíggjarlógina fyri 2001, um at játta musikk-skúlanum 950 túsund krónur eyka. Hetta uppskotið fingu vit samtykt. Og tað gjørdi stóran mun hjá musikskúlanum.

Javnaðarflokkurin vil geva tónlistini munagóðan stuðul til listarliga menning og dygd. Tí settu vit eisini uppskot fram á ting í 1999, um at stuðla tónleikarum at fáa møguleikan at vinna marknað uttanlands. Hetta fyri at breiðka føroyska vinnugrundarlagið, til eisini at fevna um tónleik. Men tað bleiv felt av samgonguni millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

Gev tónleikinum C-vitaminir. Atkvøð fyri lista C 20. januar.

# Eftirløn til øll

**Sámal Petur í Grund**
*valevndi Sjálvstýrisfloksinsí Suðurstreymoy.*



Vit føroyingar vilja gjarna kallast eitt fólk, og tað eru vit. Tó er tað soleiðis sum skaldið sigur, at vit hava trupult við at standa saman.

Ein grund til hetta er sikkurt tann ójavni sum altíð vil stinga seg fram í einum fólki.

Hesin ójavnin kann ikki tileinkigerast, og hann skal tað heldur ikki.

Men vit eiga øll at vera líka fyri lógini. Eisini teimum lógum sum áseta veitingar í teim førum har menniskjansliga orkan ikki røkkur til.

Sjálvstýrisflokkurin arbeiddi í tíðarskeiðnum 1998 til 2002 hart fyri at fáa eina skipan við eftirløn til øll upp at standa.

Lógaruppskotið lá klárt nakrar ferðir, men stundum var tað ójavnin í ideologiska baklandinum hjá samstarvspørtum okkara sum forðaði fyri eini loysn, og stundum var tað fakfelagsleiðslunar sum settust upp ímóti.

Sjálvstýrisflokkurin fer aftur hesaferð at berjast fyri at øll skulu hava eina eftirlønarskipan.

Eftirlønarskipanin skal vera fyri øll. Hon skal hava ein solidariskan part, sum er samansettur av núverandi fólkapensión og samhaldsfasta. Men hon skal eisini geva rúm fyri individuellum loysnum.

Allir borgarar í Føroyum hana rætt til eftirløn. Fáa vit hendan rættin staðfestan, so verður tað kanska lættari at standa saman um onnur stór tøk.

Set x vil lista D.

# Rættartrygdin og stýrisskipanin í vanda

**Jaspur Vang**
*valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Formaður Tjóðveldisfloksins og blað Tjóðveldisfloksins "Fregnir" leggja formannin í Fólkaflokkinum og fyrrverandi løgman undir at hava verið kriminellan, í tveimum førum at hava misnýtt landsins hægsta embæti og saman við floksfeløgum sínum at hava verið við til at fremja ymiskt landsumsitingarligt óreglusemi. Nógv bendir á, at hesir ærumeiðandi påstandir hvørki verða prógvaðir ella afturvístir. Tí eru rættartrygdin og stýrisskipanin í vanda.

Uttan mun til byrjaða valstríðið, eru skuldsetingarnar frá formanninum í Tjóðveldisflokkinum og "Fregnir" móti formanni Fólkafloksins av so álv-arsligum slag, at tær í einum vælskipaðum rættarsamfelag og fólkaræði ikki vóru farnir aftur við borðinum, uttan at fáa revsirættarligar avleiðingar. Um so er, at skuldsetingarnar eru settar fram við órøttum, átti tað at fingið fylgjur fyri tann/teir, ið settu skuldsetingarnar fram. Eru skuldsetingarnar hinvegin settar fram við røttum, átti tað sjálvsagt at fingið fylgjur fyri tann/teir, ið eru skuldsettir.

**"Hensigten helliger midlet"**

Sum ávikavist løgmaður og varaløgmaður hava høvuðspersónarnir í málinum nú gjøgnum 5 1/2 ár samstarvað um landsins leiðslu. Tað er tí undrunarvert, at kriminaliteturin, embætismisnýtslan og umsitingarliga óreglusemið ikki vórðu almannakunngjørd av Tjóðveldisflokkinum, fyrr enn vátt kom í reiðrið og Tjóðveldisflokkurin varð settur frá valdinum. Við øðrum orðum kann tí sigast, at Tjóðveldisflokkurin - so leingi hann hevði vald - kundi góðtaka kriminalitet, embætismisnýtlsu og umsitingarligt óreglusemi á løgtingi og í landsumsitingini.

**Løgregla og rættarskipan**

Vitandi um kriminalitet, embætismisnýtslu og umsitingarligt óreglusemi í ovasta politiska stýri landsins og ovastu landsumsitingini, hevur Tjóðveldisflokkurin av øllum alvi virkað fyri, at sama politiska stýrið og landsumsiting skuldu yvirtaka løgreglu og rættarskipan. Harumframt sigur formaður Tjóðveldisfloksins seg vera til reiðar at samstarva við Fólkaflokkin eftir valið tann 20. januar. Hettar kann ikki skyljast øðrvísi, enn eitt greitt prógv um, at Tjóðveldisflokkurin raðfestir vald hægri enn rættartrygd og landsumsitingarligt reglusemi.

Tá borgarin soleiðis sær, at ávísir politikarar fáa loyvi til at "vera meira líka fyri lógini enn onnur" í samfelagnum, er ikki truppult at ímynda sær, hvussu lítið rættartrygd og stýrisskipanarlóg høvdu verið vird, um nýval ikki varð útskrivað, og hesir politikarar fingu evstað vald á løgreglu og rættarskipan.

**Samanbering**

Fyri ikki meira enn uml. 10 árum síðani fekk stórur partur av landsumsitingini kollektivan dóm í sonevndu skipamálunum fyri at hava góðtikið váttanir um eginpening, hóast landsumsitingin væl visti, at eginpeningurin ikki var til staðar. Talan var her við sonnum um óreglusemi, sum eftir tágaldandi stýrisskipan ikki kundi revsast. Tí kann staðfestast, at

- óreglusemi í landsumsitingini, sum kostaði landskassanum ovurstórar milliónaupphæddir, ikki bleiv revsað fyri uml. 10 árum síðani, og at
- embætismisnýtsla og umsitingarligt óreglusemi í landsstýri og landsumsitingini, framt av kriminellum politikarum, ár 2003 ikki verður kannað til fulnar.

Ein og hvør kann so gera sær sína hugsan um, hvussu tað stendur til við rættartrygd og rættarkenslu, og hvussu stóra virðing stórur partur av okkara landspolitikarum hevur fyri stýrisskipan og fólkaræði.

Uttan rættarúrskurð er tað ikki møguligt at staðfesta, hvørt talan veruliga hevur verið um kriminalitet, embætismisnýtlsu og umsitingarligt óreglusemi, ella um talan er um falskar skuldsetingar.

Tað ber tó til at staðfesta, at so leingi nevndu álvarsomu skuldsetingar hanga í luftini, er rættartrygdin, stýrisskipanin og harvið fólkaræðið í vanda.

Vónandi fellur veljarin dóm í málinum tann 20. januar 2003.

# Vit ganga nýggjar, frælsar leiðir

**Kristina Háfoss**
*Løgtingskvinna og valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymoy*
*www.hafoss.com*



Nýtt Landssjúkrahús. Nýggj lestrarstuðulsskipan. Nýggj Sandoyar- og Suðuroyarskip. Nýtt skúlatilboð fyri ung menningartarnað. Nýggir Tjóðpallur Føroya. Nýggjar pensjónshækkingar. Nýggjur sjódepil í Vestmanna. Nýggjir undirsjóvartunnlar til Vágoy og Norðoyggjar. 123 nýggj ellis- og røktarheim runt landið. Nýggir miðnámsskúladeplar í Havn og Suðuroy. Nýggj vegastrekki, samferðsluhavnir og tunnlar. Nýggj barsilsskipan. Nýggir skattalættar á 350 mió. kr. Nýggjar granskingarverkætlanir. Nýggjur politikkur, ið steðgar beinleiðis vinnulívsstudningi. Nýggj sambýli til sinnisveik og menningartarnað. Nýggjar handilsavtalur við ES og Russland. Nýggjar yvirtøkur. Nýggj... ja, hildið kundi verið áfram.

Tí hetta eru bert nøkur av teimum ótalligu málum, ið eru framd ella skjøtul er settur á tey 6 árini, ið Tjóðveldisflokkurin hevur verið stjórnarberandi flokkur í landinum.

Hetta er hent samstundis sum yvirskot hava verið á fíggjarlógunum hvørt ár. Uttanlandsskuldin er hálverað og minkað úr 6,3 mia. kr. í 3,3 mia. kr. Uppsparingin er økt munandi og er í dag nærum 2 mia. kr. Skúlamál, almenn forsorg, skipasýn og onnur mál eru komin undir føroyskt ræði, og føroyski búskapurin er vorðin 366 mió. kr. minni heft av donskum studningi. Eisini eru 24 mál liðugt fyrireikað og klár at yvirtaka, eins og Grundlóg Føroya nærum er klár at leggja til fólkaatkvøðu.

Skulu vit steðga her ? Skal sigast farvæl til økt frælsi og framburð, og vendast aftur á gamlar leiðir ? - ella skal haldast áfram á sjálvbjargniskós, haldast áfram at taka ábyrgd og ganga nýggjar leiðir ? Valið er títt !

Aðrir flokkarnir lova at hol nú aftur skal setast á vinnulívs studningspolitikkin frá 80'inum.

Aðrir flokkar lova harvið at ábyrgdarfullur búskaparpolitikkur skal blakast fyri borð.

Aðrir flokkarnir lova at skattalættar á fleiri 100 mió. kr. verða latnir til tey við hægst lønarinntøkum - og verða rindaðir av teimum við lág- og miðalinntøkum.

Aðrir flokkar lova at farvæl skal sigast til fullveldi - farvæl til økt sjálvbjargni og størri ábyrgd.

Tjóðveldisflokkurin lovar framhaldandi sjálvbjargniskós - frælst, studningsfrítt vinnulív - sosial frambrot - avgjørda búskaparstýring og økt samband við allan heim.

Tjóðveldisflokkurin tryggjar tær, at Føroyar støðugt ganga nýggjar, frælsar leiðir fram ímóti einum fult sjálvbjargnum Føroyum fyri øll.

Vel framburð, frælsi og framtíðina !

Vel Tjóðveldisflokkin !



VALGREINAR

# Einki fullveldi her og nú

**Birgir Mohr**
*Sandur*



Tíbetur, vit fingu einki fullveldi her og nú – tann leiðin bar als ikki.

Men vit velja tann trygga vegin fram til størri sjálvstýri, so má tað taka ta tíð tað skal – og vit hava góða tíð, tí eingin og einki hóttir okkum føroyingar sum fólk. »loysing« siga vit nei til.

Fullveldisleiðin var ikki farbar, fullveldisskútan er sokkin og manningin er farin í land – avmynstrað í ótíð.

Avleiðingin av tí í 51/1 ár førda politikkinum hjá fullveldisflokkunum er:

- Sparing upp á reingerð til tey gomlu og óhjálpnu
- Sparing upp á útreiðslur til serlæknahjálp í Danmark
- Sparingar á Landssjúkrahúsinum – bíðitíð til læknahjálp
- Sparingar upp á flutningsstudning til skúlabørn
- Sparingar upp á flutningsstudning til flakavirkir í útjaðaranum
- Sparingar upp á fólkapensjón og samhaldsfasta pensjón
- Sparingar upp á røktarheimspláss
- Sparingar upp á hjálp til tey møguleikaskerdu
- Skattur skal leggjast á sodavatn, bomm, sjokulátakeks og plastposar
- Strandferðsluna, Bygdarleiðir og lastbilarnir hjá Strandferðsluni skulu spara – helst sparast burtur – til stóran skaða fyri øll uttanfyri høvuðsstaðin
- Og higartil høvdu vit bert sæð ein brøkpart av uppskotunum til at fíggja fullveldi her og nú, og hetta er í góðum tíðum

Hesum sigur Javnaðarflokkurin korta nei til. Vit vilja seta fólkið fyrst – vit vilja varðveita og menna tað góða samfelagið fyri okkum øll.

Styrkin av einum samfelag verður mett eftir, hvussu tey veikastu hava tað – og tey veikastu í Føroyum hava tað ikki gott nokk – tíverri, hóast vit hava havt 7 feit ár. Men fullveldisflokkarnir raðfestu loysing fram um vælferð.

Teirra politikkur er nú kollsigldur – Javnaðarflokkurin fer at føra ein annan politik í eini nýggjari samgongu og einum nýggjum landsstýri.

Til tess biðja vit um tína atkvøðu tann 20. januar 2004.

Gott val, veljið Javnaðarflokkin!

# Suðuroy og dunnuhyljar

**Finnleif Guttesen**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Vónandi kunnu løgtings - og kommunupolitikarnir síggja út um sín egna lítla dunnuhyl og samstarva um loysnir, sum gagnar allari oynni og ikki bert egnum dunnuhyli.

Um tað er politiskur vilji og dirvi til, at leggja 100 almenn arbeiðspláss til Suðuroy, vil tað verða ein stór avbjóðing fyri kommunurnar í oynni.

Við øking av íbúgvaratalinum vil tað blíva stilla størri krøv til kommunurnar um grundstykkir, ansingarpláss, barnagarðar, frítíðarvirksemi, ítrótt, kvøldskúlar, handlar og mangt annað og fer alt hetta, at skapa størri framburð og trivna í Suðuroy.

Vel tí Sambandsflokkin.

# Aftursvar til valevnir hjá Sambandsflokkinum

**Jacob Vestergaard**



Fleiri valevnir hjá Sambandsflokkinum í Suðuroynni hava í seinastuni gjørt viðmerkingar til støðuna í Suðuroynni.

Sambandsmonnum líkt, verður alt málað svart upp. Onki er gott, alt er neyð og elendigheit, men ítøkilig boð uppá, hvussu framtíðin skal síggja út, hava teir ikki. Argumentatiónin hongur als ikki saman.

Sambandstingmaðurin, sum, síðan hann varð valdur av suðringum, hevur búð í Havn, og havt sítt høvuðsvirksemi sum stjóri í Kollafirði, er nú, uppundir val, farin at tosa um økismenning. Hann hevur ikki nevnt økismenning ella Suðuroynna við einum orði, síðan hann varð valdur.

Eitt valevni hjá Sambandsflokkinum í Vági ynskti øllum føringum tillukku við teimum framstigum, sum vóru hend í teirra øki, men hann hevði onki at siga suðringum tillukku við, tí har var onki hent.

Orðatakið, at ein sær ikki skógina fyri berum trøum, má kunna brúkast um hetta valevnið hjá Sambandsflokkinum.

Veruleikin er jú tann, at tað ongantíð áður eru lagdir so nógvir pengar í útbyggingar av Suðuroynni, sum nú, Fólkaflokkurin hevur umsitið vinnumál.

Nýggi Smyril kemur í hesum árinum, og kemur at liggja í einari nýggjar samferðsluhavn á Trongisvágsfjørði. Ein samlað íløga uppá uml. 400 mill. kr.

Nevnda valevnið átti eisini at havt lagt merki til, at Vágs Havn verður útbygd, ein útbygging sum landið stuðlar, eins og nýggjur miðnámsskúli verður bygdur, stutt frá har hann býr.

Eitt annað valevnið hjá Sambandsflokkinum, fyrrverandi borgarstjórin á Tvøroyri, sum áður hevur verið talsmaður fyri at flyta uppgávur frá landinum til kommunurnar at umsita, hevur nú broytt støðu, og talar ímótið at flyta landsuppgávur út til kommunurnar.

Hann tosar samstundis um at flyta almenn størv úr Havn til Suðuroynna. Hesum seinast eri eg samdur við honum í, men man hann hava undirtøku frá floksformanninum, fyrrverandi borgarstjóranum í Havn, fyri at fremja hetta. Tað hevði verið áhugavert at hoyrt.

Høvdu kommunurnar í Suðuroynni, møguliga við einari felagskommunalari umsiting, sloppið at umsitið tað, sum náttúrliga hoyrir Suðuroynni til, hevði tað havt alstóran týdning fyri Suðuroynna.

Á tann hátt høvdu vit fingið okkara náttúrliga part av umsitingini til Suðuroynna, og høvdu suðringar sjálvir avgjørt, hvussu umsitingin skuldi skipast. Avgerðarætturin hevði fult og heit verið í Suðuroynni.

At billa fólki inn, at vit í Suðuroynni ikki eru før fyri at umsita okkara egnu borgarar, er at undirmeta okkara egna førleika. Hetta er vanligur sambandshugburður, slíkur hugburður ger, at vit ikki verða før fyri at menna okkum yvirhøvur.

Hesum hugburður kemur eisini greitt til sjóndar frá einum øðrum valevni hjá Sambandsflokkinum á Tvøroyri. Staðfest verður, at vit ikki eru før fyri at umsita longu yvirtikin málsøkir, tíansheldur at hugsa um at yvirtaka fleiri. Reyði tráðurin er, at vit føringar als ikki duga til nakað sum helst.

Hetta eru áhugaverd sjónarmið frá "virkis-fúsnum" sambandsmonnum, sum bjóða seg fram at umboða okkum á Løgtingi.

Slíkur hugburður er niðurbrótandi og førir ongan framburð við sær. Fortreytin fyri at fáa framburð í landinum er, at ein trýr uppá seg sjálvan og tað fólk, sum her býr.

Suðringar, við Sambandsflokkinum koma vit ongan veg, tað er sjón fyri søgn.

Fólkaflokkurin hevur seinastu árini staðið fyri menningini av Suðuroynni, og tal vilja vit halda áfram við.

Veljið Fólkaflokkin 20. januar.

# Kvinnan eigur at ráða yvir egnum kroppi

**Elin Lindenskov**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*



Í einum modernaðum norðurlendskum samfelag er menniskjan fræls. Fræls til sjálv at velja livihátt og lívsleið. Í Føroyum hava vit eina 50 ára gamla lóg um fosturtøku. Eina lóg, sum skerjir frælsið hjá kvinnuni til sjálv at ráða yvir egnum kroppi.

Hesa gomlu lóg ætlaði farandi samgonga at skerpa. Ein skerping hevði ført til, at kvinnurnar høvdu farið av landinum at fáa fosturtøku. Í øðrum lagi hevði tað ført við sær, at kvinnur ikki høvdu kent seg virdar í egnum landi - og tí høvdu valt at seta búgv aðrastaðni.

Vit í Føroyum hava ofta lyndi til at útflyta okkara trupulleikar. Harvið er trupulleikin ikki okkara longur - hini eiga trupulleikan. Tí tosa vit ikki um hann.

Men vilja vit lata eyguni upp fyri trupulleikanum, so vita vit, at har fosturtøka ikki er loyvd, skaða kvinnur seg sjálvar á óhugnaligan hátt ella eitt nú seta børnini út. Í slíkum samfeløgum er ofta eisini bann ímóti fyribyrging. Hetta ger so trupulleikan uppaftur størri.

Vit í Føroyum eiga at taka greiða støðu til fosturtøku og fyribyrging. Vit eiga at lata kvinnuna ráða yvir egnum kroppi. Vit eiga at upplýsa um fyribyrging. Og vit eiga at eggja til nýtslu av fyribyrgjandi evnum.

At taka ábyrgd frá fólki førir við sær ábyrgdarloysi. At geva fólki ábyrgd, ger at fólk handla ábyrgdarfult. Soleiðis verður gjørt í øðrum Norðurlondum, og soleiðis eiga vit eisini at gera.

Vilt tú lesa meira, um hvat eg havi tikist við seinastu 4 árini, so vitja mína heimasíðu www.lindenskov.com. Har liggja hundrað tals greinar, røður o.a. frá hesum tíðarskeiði.

# Ílegugransking

**Sámal Petur í Grund**
*valevndi Sjálvstýrisfloksinsí Suðurstreymoy.*



Eitt av teimum stóru málunum sum steðgaði upp tá undirritaða gavst í landsstýrinum í juni mánað í 2002 var málið um ílegugransking.

Hetta málið hevur víst seg at vera tíðarkrevjandi við tað at tryggleikin hjá einkulta persóninum í hesum føri er av alstórum týdningi.

Eingin ivi er um, at ílegugransking kann gerast eitt stórt íkast inn í føroyska búskapin.

Vit eru sum fólk enn í eini serstøðu hvat hesi gransking viðvíkur og áhugin fyri okkum er stórur millum granskarar í allari verðini.

Áðrenn nøkur gransking fer fram, er alneyðugt at tryggja viðkvæmar spurningar, men vit mugu heldur ikki lata tíðina fara frá okkum.

Um nøkur ár eru vit kanska ikki áhugaverd í hesum høpi longur.

Vil tú hava at hetta arbeiði verður tikið uppaftur, set so kross við lista D.